## Hødd fekk javnleik

Hødd hevur seinastu vikuna verið í Spania á venjingarlegu. Um vikuskiftið spældi Hødd venjingardyst ímóti Løv-Ham, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Málið hjá Hødd varð skotið av Kyle Ceris, sum tey í Hødd halda hevur verið besti spælarin á liðnum seinastu tíðina. Fyrsti landskappingardystur hjá Rógva Jacobsen og liðfeløgunum í Hødd verður komandi vikuskiftið.



## Einki mál hjá Blackpool

Blackpool spældi um vikuskiftið ímóti Crystal Palace í næstbestu ensku fótbóltsdeildini – dysturin var á útivølli. Eini mál kom í dystinum, sum góðir 16.000 áskoðarar sóu. Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen spældi við allar 90 minuttirnar hjá Blackpool. Nú eru fimm dystir eftir at spæla, og Blackpool liggur sum nummar 16 av 24 liðum við 50 stigum.

HB-Skála 8-1 (2-0):

# Verjan var besta álopið

*HB*

*Skála*

**Í 2. hálvleiki ressaðust offensivu landsliðsleikarnir hjá HB, og tá fór Skála fullkomuliga í uppløysning**

HB-SKÁLA
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*HB vann lemjandi stórsigur á Skála í Gundadali sunnudagin*

Við dystarbyrjan var einki, sum bendi á, at talan fór at verða um ein dag har teir appelsinlittu frá vestara armi av Skálafjørðinum fóru fullkomuliga í svart. Tað vóru góð fótbóltslíkindi í Gundadali ígjár, og fitt av HB og Skála-viðhaldsfólkum vóru møtt til fyrsta dystin hjá báðum liðunum í Formuladeildini í ár. Somu lið møttust eisini í fyrsta dystinum í fjør, men tá var leikt inni á Skála. Skálamenn vóru væl við fyrsta korterið, og longu í 3. minutti fingu teir eitt hornaspark, sum bleiv sent væl inn í brotsteigin, har skálamenn stútaðu bóltin upp um málið. Løtu seinni hevði Óbi eina naska roynd, men Marcin Dawid í HB-málinum var vakin.

### Verjan gongur undan

Men so vaknaði bjørnin úr stutta dvali sínum. Kári Nielsen bleiv fyrst hektaður inni í brotsteiginum hjá Skála, og var ivaleysur í, at hann átti at fáa brotsspark. Andrew av Fløtum, Rógvi Poulsen, Ólavur í Ólavsstovu og Christian Høgni Jacobsen brendu uppá skift. Men tá tá teir offensivu leikarnir ikki greiða sín arbeiðssetning má verjan traðka til. Í 25. minutti leggur Emil Nolsøe Leifsson ein bólt hegnisliga inn til Mortan úr Hørg, sum hegnisliga stýrir bóltin í netið. 5 minuttir seinni fær Skála-verjan ikki ruddað burtur, og Hans á Lag fær beint bóltin í málið til 2-0. Christian Høgni Jacobsen og Jákup á Borg brendu stórar málmøguleikar eftir hetta, og bara HB-verjan hevði megnað at sett Skálaverjunu uppá pláss í 1. hálvleiki.

### Lítla løtan hjá Skála

Skálamenn bjargað naskari roynd á strikuni í 47. minutti, og øll bíða bara eftir, at tað skal skrædna, men tað ger tað ikki, enn. Kári Nielsen ger eitt mistak, tann altíð skjóti og arbeiðssami Óbi fangar bóltin fer drønandi oman eftir vøllinum, og fær beint bóltin framvið Marcin Dawid til 2-1. Nú byrjaði at lukta av spenningi eina pinkalítla løtu, men skjótt var kókið tikið av grýtuni. Málið hjá Skála gav HB-liðnum, og tá serliga landsliðsleikarum tess eitt gúpp í dyntilin.

Skála-viðhaldsfólk eru ikki meir enn byrjaði at fegnast um málið hjá Óbi, fyrr enn HB punkterar dystin við tveimum vøkrum málum hjá landsliðsleikarunum Jákupi á Borg og Christian Høgna Jacobsen.

Og vóru offensivu leikarnir hjá HB kanska staddir í Turkihúsinum á Skála í 1. hálvleiki, so vóru teir staddir í Spælistovuni í 2. hálvleiki.

Christian Høgni skýtur tvey aftrat, og Andrew av Fløtum fær eisini fínjusterað kanónina, og skorar til 6-1 og 8-1. Mennirnir hjá John Petersen fóru fullkomuliga í uppløysning, og hevur venjarin eina stóra uppgávu fyri framman at fáa liðið á rættkjøl aftur.

Hjá HB sær veruliga gott út, ungi argjamaðurin, Rógvi Poulsen er ein funnin (Argja)fressur hjá liðnum, og Christian Høgni hevur longu funnið stevið, sum hann stríddist við at finna í fyrru helvt ífjør.

## Alt gekk galið

- Alt, sum kundi ganga galið, gekk galið í dag.

Soleiðis segði Skálavenjarin John Petersen eftir stórtapið ímóti HB sunnudagin.

Hansara menn hingu í fyrru 45 minuttirnar, men í seinna hálvleiki var útselt.

- Fyrri hálvleikur var okay. Teir høvdu bóltin nógva meira allatíðina, men vit høvdu eisini onkra kjans. Í seinna hálvleiki gekk alt galið hjá okkum.

John Petersen vónar, at lokalir spælarar, sum áður hava verið stuðlar á liðnum, vilja lata seg í gaggurnar aftur, nú hondbólturin er liðugur.

- Eg kann ikki rokna við hesum spælarum, so leingi sum teir ikki hava víst seg á vøllinum, men eg vóni, at teir, sum kunnu styrkja okkum liðið, vilja koma til venjing longu í næstu viku, segði John Petersen.

Millum teir spælararnir, sum ikki hava verið við higartil í ár, eru Alexandur Johansen, Pauli G. Hansen og Bárður Danielsen.

## Christian Høgni dagsins maður

Í fyrra hálvleiki vóru tað verjuspælararnir hjá HB, sum syrgdu fyri málunum, men í seinna hálvleiki tóku álopsspælararnir stafettina. Christian Høgni Jacobsen skoraði trý mál og Andrew av Fløtum tvey – hann kundi ivaleyst fingið okkurt afturat. Christian Høgni var eftir dystin valdur til dagsins mann av HB-viðhaldsfjøldini.